# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Suðuroyar Sjúkrahús:

## 40 ára starvsdagar



*Jonhild Hentze*



*Astrid Tummasarson*

Jonhild Hentze og Astrid Tummasarson hava nú í 40 ár havt sína dagligu gongd á sjúkrahúsinum í Suðuroy. Starvsfelagarnir vilja við hesum ynskja teimum hjartaliga tillukku og takka fyri gott samstarv.

**Ynskja starvsfelagarnir á skurðdeildini**

## Gullbrúdleyp

Fríggjadagin 20. oktober kunnu hjúnini Marjun og Símun Jóhan Wolles á Eiði halda gullbrúdleyp.

Tey eru bæði ættað av Trøllanesi, Marjun, født Østerø, er úr Útistovu, og Símun Jóhan úr Uppistovu. Símun Jóhan kom sum smádrongur til Eiðis til fastur sína at ferðast, og har varð hann verandi og vaks sostatt upp hjá Oluffu og Johannesi í Miklagarði á Eiði. Jóhannes var bátasmiður, og har lærdi Símun Jóhan bátasmíð, sum gjørdist lívsstarv hansara.

Símun Jóhan gjørdist kendur bátasmiður – ikki minst gjøgnum sjónvarpssendingarnar, ið Finnbogi Ísakson, sáli, gjørdi. Á andaliga økinum hevur Símun Jóhan verið virkin í samkomuni í Mizpa, og hann var kendur talari í brøðrasamkomuni.

Aftanfyri allar góðar menn er ein góð kona, verður ofta sagt, og tað er ikki minst satt í hesum føri. Marjun hevur við sínum stillføra lyndi fyrimyndarliga røkt heimið, og mong eru tey, ið hava notið blíðskap í Miklagarði. Eftir at børnini vóru farin í skúla, arbeiddi hon eitt skifti sum heimahjálp á Eiði.

Marjun og Símun Jóhan eiga 4 børn: Jóhonnu Oluffu, Astu, Óla og Absalon, og tey eiga 9 barnabørn.

Gullbrúdleypið verður hildið leygardagin 21. oktober, í Mizpa á Eiði, har høvið verður at heilsa uppá gullbrúðarparið millum kl. 13 og 19.



## Tøkk

Tað er okkum ógjørligt um dagarnar og á leiðini at minnast tykkum øll einsæris, sum gjørdu okkum krúndiamantsbrúdleypsdagin so kærkomnan. Men av og á kaga vit í gestabókina, fjarritini, gávukortini, brøvini, myndirnar og annað, og tá eru tit í huga okkara. Vit minnast tykkum og fegnast um, at tit komu ella á annan hátt gleddu okkum. Hjartaliga tøkk øll somul. Harrin signi tykkum.

**Heilsan**
**Astrid og Jógvan Gerðalíð**

**Dagurin í morgin**

**19. oktober. Baltasar.** Ein av teimum trimum vísmonnunum. Eftir halgisøguni bar hann skegg og var blámaður. Bábelskt navn, ið merkir Baal skal vejra hann.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## 25 ára starvsdagur

Í morgin tann 19. oktober hevur Páll Ismarsson Joensen starvast sum lærari á Maskinmeistaraskúlanum í 25 ár.

Páll er úr Fuglfirði, sonur Elsu Leo sunnan úr Vági og Ismar Joensen, sála, úr Fuglafirði. Páll eigur ein eldri bróður, Jóannes, sum býr saman við móðurini í Fuglafirði.

Páll tók realprógv í 1970 og fór síðani í smiðjulæru í Meka, sum P/F Brøður Petersen áttu. Hann tók sveinaprógv sum maskinsmiður á sumri 1974 og byrjaði sama summarið á Føroya Maskinskúla, haðani hann tók prógv sum maskinmeistari í juni 1976.

Hann sigldi sum maskinmeistari við portugalstrolaranum Leivi Øssursson, áðrenn hann fór til Danmarkar at lesa til víðkað maskinmeistaraprógv. Prógvið tók hann í juni 1978 á Københavns Maskinmesterskole.

Næstu stívliga 3 árini arbeiddi Páll sum el-innleggjari á sildaverksmiðjuni Havsbrún í Fuglafirði. Hetta vóru sera lærurík ár saman við Jóannesi Thomsen, góðkendum el-innleggjara.

Páll byrjaði sum lærari í føstum starvi á Føroya Maskinskúla 19. oktober 1981. Hann undirvísti fyrstu tíðina í motorlæru og eltøkni. Seinnu árini hevur hann undirvíst í eltøkni, automatión, støddfrøði og teld. Hann hevur eisini virka sum telduvørður á skúlanum, líka síðani skúlin fekk teldur á fyrsta sinni.



Páll hevur verið á nógvum skeiðum, serliga í automation, el- og teldutøkni. Á heysti 1997 var hann saman við fýra lærarum á øðrum føroyskum vinnuskúlum á boriskeiði í Noregi og tók prógv í oljuboritøkni.

Páll hevur í mong ár havt stóran áhuga fyri føroysku náttúruni, og honum dámar væl at ganga í haganum. Páll er góður við føroyska málið, ein sannur móðurmálsvinur. Faðirin, Ismar, var skald og yrkti nógv. Í 1994 savnaði Páll og gav út bókina Úr hugans heimi eftir faðirin.

Sum starvsfelagi hevur Páll roynst sannur álitismaður, trúfastur og góður at samstarva við og altíð hjálpsamur. Hann hevur altíð verið fremsti íbirtarin, tá ið nakað skuldi setast í verk, m.a. tá ið skúlin í 1987 fór undir víðkaða maskinmeistaraprógvið, tá ið el-innleggjaraskúlin skuldi byrja, og tá ið arbeitt var fyri at fáa skúlanum egin hølir at vera í. Tá stóð Páll altíð í fremstu røð, hansara partur lá ongantíð eftir. Við sínum hegni og stillu framferð skapti hann bæði álit og virðing uttan um seg.

Eisini millum næmingarnar hevur Páll verið høgt í metum. Tann, ið fekk Páll sum lærara, helt seg av røttum at vera væl fyri. Hann hevur heldur ikki eina einastu ferð í øll 25 árini fingið so mikið sum eina klagu frá næmingunum.

Góði Páll: Vit starvsfelagar takka tær fyri eitt gott samstarv og vilja ynskja tær hjartaliga til lukku á 25 ára starvsdegnum. Samstundis harmast vit um at tú, hóast allar nevndu persónligu eginleikar, skalt koyrast úr starvinum vegna ein pástand um beint tað øvugta av tí, tú stendur fyri.

**Starvsfelagar**



Lesið Sosialin so eru tit við